## 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 7 | 5 - 2 - 0 | 18 | 5 | 13 | 17 |
| 2 | HB | 7 | 4 - 2 - 1 | 18 | 8 | 10 | 14 |
| 3 | VB | 7 | 3 - 3 - 1 | 11 | 6 | 5 | 12 |
| 4 | NSÍ | 7 | 3 - 3 - 1 | 12 | 10 | 2 | 12 |
| 5 | B36 | 7 | 2 - 3 - 2 | 13 | 11 | 2 | 9 |
| 6 | EB/Streymur | 7 | 2 - 2 - 3 | 12 | 10 | 2 | 8 |
| 7 | KÍ | 7 | 1 - 5 - 1 | 9 | 10 | -1 | 8 |
| 8 | GÍ | 7 | 2 - 2 - 3 | 8 | 14 | -6 | 8 |
| 9 | ÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 11 | 22 | -11 | 4 |
| 10 | B68 | 7 | 0 - 1 - 6 | 5 | 21 | -16 | 1 |

## 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 7 | 5 - 0 - 2 | 20 | 10 | 10 | 15 |
| 2 | Royn | 7 | 5 - 0 - 2 | 21 | 13 | 8 | 15 |
| 3 | AB | 7 | 4 - 2 - 1 | 12 | 8 | 4 | 14 |
| 4 | B71 | 7 | 4 - 1 - 2 | 18 | 18 | 0 | 13 |
| 5 | FSV | 7 | 3 - 2 - 2 | 23 | 14 | 9 | 11 |
| 6 | Sumba | 7 | 3 - 2 - 2 | 11 | 10 | 1 | 11 |
| 7 | B36 | 7 | 2 - 1 - 4 | 10 | 18 | -8 | 7 |
| 8 | KÍ | 7 | 1 - 2 - 4 | 13 | 18 | -5 | 5 |
| 9 | LÍF | 7 | 1 - 2 - 4 | 8 | 16 | -8 | 5 |
| 10 | VB | 7 | 0 - 2 - 5 | 7 | 18 | -11 | 2 |

## Máltindurin

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Bogi Gregersen | Skála | 6 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 6 |
| Heine Fernandez | HB | 5 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 5 |
| John Petersen | B36 | 4 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 4 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 3 |
| Rúni Elttør | ÍF | 3 |
| Atli Danielsen | KÍ | 3 |
| Milan Kulic | VB | 3 |
| Áki Mørk | B36 | 2 |
| Bárður Mortansson | B36 | 2 |
| Egil á Bø | B36 | 2 |
| Øssur Hansen | B68 | 2 |
| Hallur Jacobsen | EB/S | 2 |
| Rúni Nolsøe | HB | 2 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 2 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 2 |
| Erling Fles | KÍ | 2 |
| Jacob Bymar | KÍ | 2 |
| Stig Aksnes | KÍ | 2 |
| Gert Langgaard | NSÍ | 2 |
| Ian Højgaard | NSÍ | 2 |
| Jónstein Petersen | NSÍ | 2 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 2 |
| Nenad Stankovic | Skála | 2 |
| Mindaugas | VB | 2 |
| Palli Augustinussen | VB | 2 |


VARPIÐ

Skráir og ummælir

16 síður

Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2


# Knassar í Ishøj

**Um vikuskiftið varð árliga stevnan í Ishøj hildin, og sum vant, sum var kappróður eisini partur av hesari.**

**Vit hava fingið sendandi myndirnar av teimum báðum manningunum, sum vunnu róðrarnar fyri ávíkavist 6- og 10-mannafør. Nevnliga Royndin og Havnarbáturin.**

**-jm**



*Manningin á Havnarbátinum. Standandi frá vinstru: Børge B. Hansen, Lutherus Hansen, Karl Erik Reynheim, Hans Petur Joensen, Høgni Egholm, Frímund Sivertsen og Hannis Joensen. Húkandi f.v.: Heðin Mortensen, Karl Oliver Bærentsen, Hans David Hansen og Eivind Danielsen*



*Í 6-mannafarsróðrinum eydnaðist Royndini at vinna. Standandi frá vinstru eru tað Birgir Sondum, Steinfinn Mittelstein, Andre Wraae og Heðin Hansen. Húkandi Gunnar Gregoriussen, Paul Kragesteen og Jón Herluf Persson*



# Jarðarstykkir á Norðtoftum til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða niðanfyri nevndu jarðarstykkir við hesum lýst til sølu undir einum:

**Matr.nr. 27, Norðtoftir:** 1 gyllin av parti í haga, Norðtoftahagi 2/9 í felags matr.nr. 45
**Matr.nr. 31, Norðtoftir:** 1 gyllin av parti í haga, Norðtoftahagi, 2/9 í felags matr.nr. 45
**Matr.nr. 37, Norðtoftir:** 2 gyllin og 10 skinn av parti í haga, Norðtofta-hagi, 5/9 í felags matr. nr. 45.

Áhugað verða vinarliga biðin um at venda sær til:

## Advokatfelagið

Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
Telefontíð: 9³⁰-12⁰⁰ og 13⁰⁰-16⁰⁰

Tórmó›ur Djurhuus, adv. | Ingi Højgaard, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. | Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. | Anna Dam, adv.

# Eiðis skúli

## Søkt verður eftir lærarum til Eiðis skúla

• 2 tíðaravmarkað størv skúlaárið 2004/2005 fyri lærarar í farloyvi. Størvini eru fulltíðarstørv.

Skúlanum tørvar m.a. lærarar, ið kunnu undir´visa í alisfrøði, tónleiki, KT og svimjing (gentur).

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum á tlf. 423579 ella 229045.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 24. juni 2004.

**Skúlastýrið**
/Annika Egholm
470 Eiði

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.-7. árgangi. Skúlin er fyri kortum bygdur út við serstovum, lærarahølum og ítróttarhøll, og hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Komandi skúlaár verða 6 lærarar og 77 næmingar í Eiðis skúla.

# Tofta skúli

Fyrilestur verður í Tofta skúla fríggjakvøldið 18. juni kl. 20.00 við svianum Birgit Grundberg, serlærara og lærara í Taktil Stimulering.

Taktil Stimulering er ein svenskur viðgerðarháttur innan skúla- og heilsuøkið, ið gevur eina betri kropsfatan og fær okkum at slappa av.

**Tofta skúli og skúlastýrið**

**Dagstovnurin í Hoyvík**
**Vegurin Langi, 188 Hoyvík**
**Tlf. 317319, 317452**

# Kom og arbeið hjá okkum!

**Vit eru 10 fryntligir og ágrýtnir pedagogar, sum saman við okkara dugnaligu hjálparfólkum mangla starvsfelagar.**

**Vit hava brúk fyri 3 pedagogum, at byrja 1. august 2004.**

**1 pedagog 40 tímar í vøggustovu við 10 børnum, reyða hús.**

**1 pedagog 35 tímar í vøggustovu við 10 børnum, grøna hús.**

**1 pedagog 20 tímar í barnagarð við 15 børnum, reyða hús.**

**Um stovnin:**
Vit eru ein sjálvsognarstovnur, normerað til 72 børn, 30 vøggustovubørn og 42 barnagarðsbørn. Vit hava 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, sum eru býttar upp í 3 hús, 1 barnagarðs- og vøggustova í hvørjum húsi.

Uttan fyri er ein góður garður, sum er mennandi fyri børnini og góður at spæla í.

**Løn:**
Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag. Freistin at søkja er 28. juni kl. 12.00.

Eru spurningar um arbeiðini, ring til Jóhannu tlf. 317319 ella 317452, lokal 15.

Leiðslan tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

Umsóknir skulu sendast til:

**Dagstovnurin í Hoyvík**
**Vegurin Langi**
**188 Hoyvík**
**Viðmerkjast pedagogstarv**

# Vestmanna Skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2004/2005 fyri lærara í farloyvi, lækkað tímatal o.a.; fulltíðarstørv og parttíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 424360, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2004.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna

Ergo & Hjálpartól - alt innan hjálpartól -

# Ergoterpeutur

Søkt verður eftir ergoterapeuti, at arbeiða uml. 20 tímar um vikuna.
Arbeiðið umfatar mest ergoterapeutiska viðgerð av børnum við serligum tørvi og ráðgeving.

Børnini hava sera ymiskar trupulleikar og diagnosur so sum eti- og talutrupulleikar, motoriskar trupulleikar, down syndrom, autisme, spastikarar, seinment , fjølbrekað o.a.
Ynskiligt er um viðkomandi hevur royndir við børnum, men er hetta eingin treyt.

# Ergoterapeutur

Søkt verður eftir ergoterapeuti til avloysarastarv juli og august 2004.
Arbeiðið umfatar ergoterapeutiska viðgerð av børnum við serligum tørvi og ráðgeving.

# Sølufólk

Til arbeiði um alt landið verður søkt eftir royndum sølufólkið.

Starvið fevnir um:
- Røkja verðandi viðskiftafólk.
- Uppsøkjandi søluarbeiði.
- Tilboðsgeving.
- Upplæring av viðskiftafólki.

Vit bjóða eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, við nógvum avbjóðingum.

Umsøkjari við royndum innan hjálpartólaøkið hevur fyrimun, hetta er tó eingin treyt, neyðug upplæring fer fram í Føroyum og uttanlands.

Góður málkunnleiki í skrift og talu er ein fyritreyt, eins og koyrikort er neyðugt

# Handilsfólk

Søkt verður eftir fólki til avloysarastarv til handil okkara.
Arbeiðið umfatar handilsarbeiði og annað fyrifallandi arbeiði. Arbeiðstíðin er hvønn gerandisdag frá kl. 12 -17.30

Vit vænta at tú ert:
- Álítandi
- Fyrikomandi
- Røsk/raskur

Ynskiligt er um viðkomandi kennir til hjálpartól og ergonomiska útgerð, men er hetta eingin treyt.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til leiðarin á tel 215 778.

**Skrivlig umsókn við viðmælum og CV verður at senda til, viðmerkjast skal á brævbjálvan hvat starv søkt verður um:**

Ergo & Hjálpartól - alt innan hjálpartól -

**J.C Svabosgøta 8 * FO 100 Tórshavn**
**www.ergo.fo**

Ergo & Hjálpartól er ein fyritøka, ið umframt at selja hjálpartól til stovnar, sjúkrahús og privat um alt landið, eisini bjóðar ergoterapeutiska ráðgeving og viðgerð.
Fyritøkan er stovnað í 2001 og er í støðugari menning.